



Zarepta



# Zarepta-legurnar 2008

Um GUD vil, er ætlanin at hava hesar legur
í Zarepta í Vatnsoyrum í summar:

| | | | Frá | | Til |
|---|---|---|---|---|---|
| Lega fyri brekað | | Hós. | 17.04 | Sun. | 20.04 |
| Lega fyri støk (30 ár og eldri) | | Fríg. | 23.05 | Sun. | 25.05 |
| Familjulega I | | Leyg. | 31.05 | Fríg. | 06.06 |
| Familjulega II | | - | 07.06 | - | 13.06 |
| Familjulega III | | - | 14.06 | - | 20.06 |
| Familjulega IV | | - | 21.06 | - | 27.06 |
| Summarlega I | ( 16-17 ár) | Sun. | 29.06 | Leyg. | 05.07 |
| Summarlega II | ( 14-15 ár) | - | 06.07 | - | 12.07 |
| Summarlega III | ( 13 ár) | - | 13.07 | - | 19.07 |
| Summarlega IV | ( 12 ár) | - | 20.07 | - | 26.07 |
| Summarlega V | ( 11 ár) | - | 27.07 | - | 02.08 |
| Summarlega VI | ( 10 ár) | - | 03.08 | Fríg. | 08.08 |
| Summarlega VII | ( 9 ár) | - | 10.08 | Hós. | 14.08 |
| Familjulega V (Fyri familjur við børnum við breki) | | Hós. | 14.08 | Sun. | 17.08 |
| Familjulega VI | | Sun. | 17.08 | Leyg. | 23.08 |
| Bíbliuskeið | | Sun. | 24.08 | Sun. | 31.08 |
| Lega fyri 18 ár og eldri | | Fríg. | 05.09 | Sun. | 07.09 |
| Kvinnustevna | | - | 12.09 | - | 14.09 |
| Manstevna | | - | 19.09 | - | 21.09 |
| Hjúnastevna I | | - | 26.09 | - | 28.09 |
| Hjúnastevna II | | - | 03.10 | - | 05.10 |
| Heystlega | (14-17 ár) | - | 10.10 | Mik. | 15.10 |

**Nær tekningin fer fram verður lýst seinni.**


## Høvdingin hjá The Dreams




Tónleikaframleiðarin Chief 1 hevur seinasta árið arbeitt tætt saman við føroyska bólkinum The Dreams. Hann hevur skrivað og framleitt sangir saman við teimum, og hann skal við sínum kontaktum í donsku tónleikavinnuni fáa The Dreams fram í ljósið. Vit hitta Chief 1 og práta við hann um The Dreams, hví hann samstarvar við teir, og hvussu langt bólkurin kann røkka.

## Frá fjølmiðlum til politikk




Bjørt Samuelsen kom strúkandi í løgtingið á valinum leygardagin, meðan John Johannesen skuldi ígjøgnum alt kenslubarometrið, áðrenn hann var innanfyri. Vit hitta tey bæði fyrrverandi fjølmiðlafólkini til eitt prát um lopið úr fjølmiðlaheiminum og til politikkin. Vit spyrja tey eisini um, hvussu tey ætla at halda vallyftini, og hvat í føroyska samfelagnum kann gera tey stúrin.

## Dávur var stjørnan




Føroyski trombon-spælarin Dávur Juul Magnussen var stóra stjørnan á konsert hjá Royal Scottish Academy Brass í Glasgow nú um dagarnar. Tað heldur skotskur ummælari í blaðnum The Herald. Hann heldur, at Dávur hevur ein bjarta framtíð sum tónleikari. Vit ringja til Dávur og práta um tónleikalesnaðin í Skotlandi og um góða ummæli.

